## Ronaldo heldur fram í United

Líkt er til, at portugisiski stjørnuspælarin Cristiano Ronaldo heldur fram at spæla fyri Manchester United. Í summar hevur annars verið tosað nógv um, at Ronaldo skuldi skifta til Real Madrid, men hetta verður av ongum. - Tá teir gera av at selja Ronaldo, so kunnu vit keypa hann. Men sum tað sær út í løtuni, verður tað einki beint nú, sigur Ramon Calderon, forseti í Real Madrid. Hann heldur, at tað er sannlíkt, at Ronaldo spælir eitt ár afturat í United, áðrenn hann skiftir til Real Madrid.



# Riddarin smurdi hinar av

**Miðvingar vóru meiri enn eina bátslongd frammanfyri Sundabátin og Tvørabátin, sum fyrr í summar hava verið favorittarnar**

KAPPRÓÐUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru nýggjar tíðir í kappingini millum 6-mannafør við monnum. Kappingin í Vestmanna var rimmar staðfesting av, at tað var ikki bara hepni og, sum teir nú plaga at siga í fótbólti, at teir raktu dagin, at Riddarin vann fyri á eystanstevnu.

Hóast hann ikki fekk besta startin, so var Riddarin fremstur, tá ið startspurturin var reiðiliga av, og síðani var spurningurin bara, hvussu sannførandi sigurin hjá miðvingum skuldi verða.

Riddarin var væl og virðiliga leysur av teimum næstu. Leingi tóktist tað sum um, at Tvørabáturin hesa ferð skuldi liggja á Sundabátinum, men soleiðis endaði tað ikki. Sundabáturin var leingi smoykin, men í endaspurtinum eydnaðist tað teimum norðan úr Sundi at tryggja sær næstfremsta plássið, sum ber við sær, at teir framvegis eru besta FM boðið.

Men í løtuni tykist eingin ivi at vera um, at tað eru miðvingar, sum eru teir stinnastu í kappingini millum 6-mannaførini.



*Sigurin á eystanstevnu var ikki av tilvild. Riddarin vant hesa ferð burtur úr bæði Sunda- og Tvørabátinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Jarnbardur er í serflokki

**Vestmannakvinnur umborð á Fortunu løgdu ógvuliga bragdliga fyri, men eftir startspurtin var eingin ivi um, hvørt tað var, sum fór at vinna**

KAPPRÓÐUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var ikki um nakra kapping millum 6-mannaførini við kvinnum. Jarnbardur var púra sannførandi, og var meiri enn leysur av næsta kappingarneytanum, tá ið bátarnir fóru um málið.

Merkisvert var tað, at Fortuna úr Vestmanna legði øgiliga bragdliga fyri. Fortuna skræddi seg tað allar mesta av einari bátslongd framum Jarnbard í startspurtinum, og eina evarska lítla løtu kundi tað tykjast sum um, at ein vón kveiktist í Vestmanna, at tað skuldi eydnast hvíta bátinum við grønum stokki at vinna í heimasjógvi.

Men soleiðis var tað bara eina heilt lítla løtu. Kvinnurnar umborð á Jarnbardi lótu seg ikki taka av fótum ella rættari, so mistu tær ikki áralagið av, at tær eina løtu høvdu ein bát frammanfyri seg. Í sínum góða, sannførandi og væl kenda áralagnum togaðu tær seg framum Fortuna, og harvið var tað.

Gongurólvur, sum fyrr í summar hevur vunnið ein róður, smokkaði saman við Lómi heilt burtur ímillum í kappingini.

# Heiða, Heiða, Heiða, Heiða...

**Heiðabáturin er í serflokki, og einasti spurningurin er, hvør stendur við silvurmerkjunum, tá ólavsøkan er av**

KAPPRÓÐUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Heiðabáturin er besta 8-mannafarið í ár. Tað er eingin ivi um tað. Harvið er tað ikki nakar spurningur, hvør verður meistari, og tað er heldur ikki nakar spurningur, nær Heiðabáturin fer at tryggja sær FM heitið. Tað ger hann á Vestanstevnu í Miðvági leygardagin.

Hesa ferð skræddi Heiðabáturin seg framum næstu kappingarneytarnar beinanvegin, og so stýrdu teir umborð á gula bátinum róðrinum.

Undan Fjarðastevnu var Agjabáturin best fyri í kappingini um silvurmerkini. Leygardagin vóru teir aftan fyri Árnfirðingin, og eisini í startinum vóru teir somikið seinir, at teir fingu gult korti fyri at vera ov seinir.

Árnfirðingur leyp fyrstur avstað. Eftir at guli báturin hevði tikið grøna Árnfirðingin, megnaðu teir úr Árnafirði at halda tørn um næstfremsta plássið. Árnfirðingur lá á lærinum á Heiðabátinum, tá ið bátarnir fóru um málið, og Árnfirðingur var leysur av Argjabátinum, sum var skutin frammanfyri Kvívíkingin.

Árnfirðingur er við hesum eitt stig framman fyri Argjabátin í kappingini um silvurið.




*Heiðabáturin er í serflokki*

*Mynd: Jens Kristian Vang*